## DAGSINS MEINING

# Fremmandur fuglur

Politiska skipanin í Føroyum er minni búgvin á summum økjum enn í grannatjóðum okkara. Nevnast kann trekleikin at gera semjur tvørturum miðjuna og tvørturum samgongumark, soleiðis sum vit síggja tað við óvilja Tjóðveldisfloksins at taka undir við at víðka Samhaldsfasta. Tá tað er sagt, so er skipanin meira búgvin á øðrum økjum. Mátin arbeitt verður uppá í grannalondum hóskar ikki altíð til føroysk viðurskifti, og kann meira enn so gera meira skaða enn gagn. Her verður serliga hugsað um pre-fabrikeraðar meiningar, parolur ella líknandi til fólk at skriva undir uppá. Vit eru eitt norðureuropeiskt land, har sjálvstøðug hugsan og sjálvstøðug formulering verður virðismett, og verður hetta vónandi ikki broytt óansæð, hvat man annars meinar um fullveldi ella ikki.

Ein sokallaður politiskt óheftur felagsskapur við tøttum tilknýti til Tjóðveldisflokkin roynir at samskipa eina herferð móti løgmanni, ið roynir samráðing heldur enn høpisleysa konfrontatión. Útyvir at vera illoyalt móti samgongufelaganum, so er tað sera hugstoytt at lesa, at finnast skal at Føroya Løgmanni ikki bara einaferð, men »við eitthvørt høvi«.

Í føroyskum politikki vísir tað seg bert at vera fullveldisfortalarnir, ið hava henda ótespiliga máta at arbeiða uppá. Onkur limur í Hesuferð, ið kanska hevur skrivað sjálvur, roynir heldur óbeskeðið at peika á respekteraðar organisatiónir sum Amnesty International, ið gera líknandi ting, og tykist tað sum um, at hann ikki dugir at skilja ímllum protestaktiónir og politiskt kjak.

At fangar verða píndir í suðuramerikonskum fangatippum er, vilja vit stillisliga pástanda, nakað heilt annað enn at Føroya Løgmaður samráðist við danir. Sea Sheperd felagsskapurin heitir eisini á fólk um at skriva ávís ting til ávísar móttakarar sum eina protestaktión, so tað eru ikki bert respekteraðar organisatiónir sum Amnesty International, ið nýta slíka framferð.

Framferðarhátturin hjá Hesuferð limunum er undir øllum umstøðum fremmandur fuglur í Føroyum, og vónandi verður tað eisini so framyvir.

Tað má bera til at leggja fram síni sjónarmið um eina ódámliga framferð, uttan at ávísir flokkar og einstaklingar, ið ikki hava ábyrgina av Hesuferð herferðini skulu áleypast. Fullveldisfortalarir mugu góðtaka, at teir hava eitt sjónarmið, ið ikki allir flokkar eru foreintir við – meiningar eru ikki einsrættaðar í einum demokratiskum samfelag, óansæð um talan verður um fullveldi ella ikki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Har fer Jóannes skeivur.

**Lisbeth L. Petersen,**
*Sambandsflokkurin*



Tað skuldi verið so langt frá mær at arga Javnaðarflokkin, soleiðis sum Jóannes Eidesgaard annars vil gera tað til í eini viðmerking leygardagin. Hetta ger hann í sambandi við eina samrøðu, sum blaðmaður á Sosialinum hevði við meg í seinastu viku.

Av tí at eg ikki rættiliga kendist við tað, sum Jóannes sigur, royndi eg at lesa blaðgreinina umaftur fyri at finna eina møguliga orsøk til, at Jóannes er vorðin firtin.

Einasti møguleiki eg haldi meg síggja er, at spurningarnir frá blaðmanninum eru ikki prentaðir við í greinini, ið snýr seg um nógv umrødda búskapargrunnin og tær viðmerkingar, sum Karstin Hansen í hesum sambandi hevur til støðu Javnaðarfloksins.

Landsstýrismaðurin hevur sagt seg vilja broyta navnið á grunninum, so Javnaðarflokkurin verður nøgdur, og taka skiftisgrunnin burturúr, og tað frøist Jóannes um samb. fjølmiðlunum.

Fyri Sambandsflokkin havi eg sagt, at vit hava ikki álit á hesi samgonguni, og vit halda ikki, at hon skal vera tann, sum skipar fyri einum oljugrunni, tí málið hjá hesi samgonguni er fullveldi, og teirra ætlan við grunninum er, at hann, hvussu hann so verður nevndur, skal fíggja fullveldið antin so ella so. Harumframt situr henda samgonga ikki so langa tíð aftrat

At Jóannes er so firtin, tí Javnaðarflokkurin verður nevndur, fái eg illa gjørt nakað við. Eg havi svarað teim spurningum mær vóru settir av blaðmanninum m.a. um tað, sum landsstýrismaðurin sigur um støðu Javnaðarfloksins.

Hvussu hetta skal tulkast sum misálit á Javnaðarflokkin, skilji eg ikki. Tvørturímóti havi eg ferð eftir ferð sagt, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava eina felags sak at arbeiða við og stríðast fyri í hesum tíðum, og tí ræður um at standa saman.

Eitt kann eg so sum formaður Sambandsfloksins siga fyri heilt vist: Tá ræður um loyalitet og samstarvsvilja í mínum politiska arbeiði, so skal mín partur ikki liggja eftir, men eg krevji samstundis, at tað sama er galdandi frá hinari síðuni.

# Sprellimaður og gorrandi skræðugákur

**A. Guttormur Djurhuus**



Í Sosialinum 14. august 2001 hevur Rolt Guttesen, lektari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, grein har hann lýsir varaløgmann og – seg sjálvan.

Hann sigur um varaløgmann at hann er: kotamaður, gorrari, avhøvdari, orðloysingur, bedrøviligur skræðugákur, fantastur og hevur verið uppi í fíggjarligum sviki (yvirtrekt kontoina hjá sjónvarpinum við 3 mill.).

Øll hesi blómandi invektiv í sama stubba. Ikki kann sigast at hann, RG, er uttan málsligar gávur!

Harumframt skrivar hann um fólkini aftanfyri »Hesuferð«, at tey eru at sammeta við schutsstafel (SS), har leiðarin er Kjartan Hoydal. Eisini skrivar hann, at loysingarvongurin í føroyskum politikki vil loysa við »endlösung«, sum var nasistiska loysnin av jødaspurninginum. Jødarnir skuldu heilt einfalt beinast av vegnum. Tulkingin av hesi útsøgn kann bert verða, at hann heldur, atlsoyingarvongurin fer at tína sambands- og javnaðarmenn, eins og nasistarnir gjørdu við jødarnar.

Eg kann vissa Rolf Guttesen um, at so verður ikki. Eingin sambands- ella javnaðarmaður verður gassaður, ella settur í gulaglegu. Fyri tað kann hann kenna seg tryggan og koma ekkalsyur heim á klettarnar at vitja, aftaná at loysingin er tikin og vissa seg um við egnum eygum at so varð ikki.

Í einum løgnum broti sigur maðurin: »at tjóðveldis- og hesuferðfólki longu sita á Útvarpinum og Sjónvarpinum eisini í øðrum miðlum. So skjótt kunnu teir sita á propagandaapparatinum og maktapparatinum«.

Ikki vísir hetta serliga stóra virðing fyri fjølmiðlum sum upplýsandi og stabiliserandi faktori mótvegis statsmaktini. Eisini vísir tað, at maðurin vil hava sett í verk »beruvsverbot« innan fjølmiðlaheimin. Tankin er ræðandi, men tó helst hvørki fjarur ella fremmandur fyri ein fyrrverandi trúgvandi stalinist.

Einaferð hevði RT hugflog. Tað var, tá ið hann var stalinistur! Sjálvur sigur hann, at hann hevur: »viðurkent politiska mistakið, aðrir ikki«. Helst misti hann flogið, tá hann viðurkendi politiska mistakið og fór undir skjúrtuvelið á danska javnaðarflokkinum og gjørdist trúgvandi danskur javnaðarmaður.

Ella gjørdist hann sálarliga brekaður av ógvusligu broytingini, sum má hava verið sera traumatisk, og tí hevur hjálp og stuðul fyri neyðini.

Tí ikki kann tað veruliga vera so einfalt at Rolf Guttesen sjálvur á gamalsaldrinum, núrkan er fairn at bila, er vorðin »sprellimaður og gorrandi skræðugákur« hjá danska javnaðarflokkinum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Fregnir ikki tann rætti at sáa iva um trúvirðið hjá nøkrum

**Óli Jacobsen**



Eg havi í nógvum greinum kunnað dokumenterað, at Føroyar er eitt »lágprís« rættarsamfelag, bæði politiskt og umsitingarliga.

Bert í hesi samgonguni hevur verið prógvað, at FF í tveimum førum er sett uttanfyri lóg og rætt. Tað er eisini dokumenterað, at hetta er gjørt í stríð við tey rættarprinsipp sum eru galdandi í restina av ríkinum og annars í einum veruligum fólkaræði. Men tað ófrættakenda er, hetta verður gjørt uttan fráboðan og frágreiðing. Ein og hvør roynd at fáa eina frágreiðing og grundgeving er sum at renna seg ímóti einum betongmúri. Øll skipanin, íroknað andstøða á tingi og fjølmiðlar eru so »sammenspist«, at slík rættarbrot móti borgarum verða tøgd í hel.

Men nú er Fregnir farið í aktión! Og tað er ikki við at viðgera hesi álvarsmál, sum blaðstjórin sum samfelagsfrøðingur skuldi havt serligar fortreytir fyri at viðgera. Nú ræður um at skapa iva um trúvirði hjá tí, sum loyvir sær at vísa á, hvussu Føroyar miðvíst verður avriggað sum rættarsamfelag. Og tað verður gjørt við einum gomlum primtivum tricki: »Tú skal bara halda kjaft. Tú sum hevur fingið so og so høga bíðiløn sum landsstýrismaður uttan at tala at.« Hóast hetta eru viðurskifti sum eg onga sum helst ávirkan havi havt á.

Tað er sjálvsagt í lagi at slík mál verða tikin upp. Eg skal fegin viðganga, at eg helt skipanina við bíðipening vera órímiliga, og hetta gjørdi eg eisini vart við í landsstýrinum. Men hetta kann so á ongan hátt broyta tað, sum eg havi skrivað um rættarstøðuna í Føroyum. Men hesi viðurskifti hevur Fregnir als ongan áhuga fyri. Nyrup er samb. Fregnir størsti »fani« av verðini, tí hann ikki skal yvirhalda demokratiskar spælireglur. Men at politisku bossarnir hjá blaðstjóranum nýta somu framferð móti egnum borgarum, sum kastað verður Nyrup fyri, skal ikki koma fram. Tí so sigi eg hitt!!

Og hervið koma vit til kjarnan í hesum máli, og tað er dupultmoralurin. Nýggja leiðslan í flokkinum hjá Fregnir hevur ført seg fram sum teir ið skuldu umboða reinleika í politikki. Sjálvt »bróðurmorðið« á Signar á Brúnni hevur verið marknaðarført sum politiskur reinleiki á ein hátt sum sjálvt ein Goebbels ikki hevði kunnað gjørt tað betri. Hetta var tó áðrenn »Fregnir«. Men menninir aftanfyri eru teir somu!




*Boðskapurin í hesi tekning kann lýsing í tveimum orðum:»Frælsi valdast.« Tað sama kann sigast um »frælsið«, sum Fregnir sigur seg umboða.*

Dentur hevur verið lagdur á, at í fyrireikingini av tí nýggja paradísinum var tað av avgerandi týdningi at fáa eitt so breitt orðaskifti sum gjørligt millum borgarar. Tað sæst greiðari og greiðari, at hetta bert eru lótir. Hetta er enn einaferð váttað. Sjúrður Skaale er ikki annað enn ein rakkaraknektur hjá fólki, sum nýta »frælsi« sum páskot fyri at fáa makt sjálvi.

Tí er hann ikki tann rætti at seta spurnaðartekin við trúvirðið hjá øðrum!

# Kolumbusaregg, eftirlønir og sjálvmál

**Sámal Petur í Grund**
*landsstýrismaður*



Í grein í Dimmalætting fríggjadagin 10.august hevur Atli Hansen eina grein við ivirskriftini, »Sambandsflokkurin setur enn eitt kolumbusaregg.«

Grundarlagið fyri hesi rámandi ivirskrift er uppskot sambandsfloksins um at seta pening av til Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Atli Hansen ásannar, hvat hvør einasti politikari og helst nærum allir borgarar landsins vita, at stórstu sjónligu trupulleikarnir í samfelagnum liggja á almannaøkinum.

### Hongur ikki saman.

Men tað eru nøkur ting sum ikki hanga saman í greinini Atli skrivar.

Atli førir fram, á sama hátt sum Eivind Jacobsen hevur gjørt tað í blaðgrein áður og Suni Jacobsen tingmaður gjørdi tað undir umrøðuni av uppskoti Sambandsfloksins um innskot í Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, at tað sum henda samgongan hevur gjørt á eftirlønarøkinum ikki munar nakað.

Orsøkin til at hetta ikki hongur saman er hon, at batin á eftirlønarøkinum, sum hevur viðført eina hækkan í viðbótum uppá umleið 1200,00kr verður gjørdur til einkis, samstundis sum ein upphædd sum er minni verður gjørd til eitt kolumbusaregg.

Sitandi samgonga hevur á einum øki sum er sera trupult gjørt nakrar ítøkiligar batar sum er komin teim veikastu í skipanini tilgóðar.

Samstundis hava batarnir nærum ikki verið til at fáa eyga á hjá nøkrum av teimum sum eisini eru í skipanini.

Grundin til hendan misjavna er tann sannroynd, at eftirlønarøki hevur verið afturútsiglt og hevur tað viðført, at einstakir borgarar og fakfeløg hava gjørt sínar egnu skipanir.

Hesar skipanir hava so viðført, at tey sum eru umfataði av teimum eru ikki millum tey veikastu í skipanini og hava tí ikki merkt stóran bata.

Men tað reingist ikki, at í hesum samgonguskeiðnum eru hendir batar í vilkorum hjá flestøllum eftirlønarmóttakarum.

Samhaldsfasti eftirlønargrunnurin er byrjaður at gjalda út, eina upphædd sum í dag er uppá 513,00kr. mánaðarliga. (henda samgongan hevur ikki æruna av hesum)

Ringast stillaðu eftirlønarmóttakararnir hava harumframt fingið eina hækkan í viðbótini uppá 1300,00kr. mánaðarliga.

At hesir batar verða tileinkisgjørdir, samstundis sum ein upphædd uppá 1000 – 1200 kr. skal verða eitt kolumbusaregg, boðar ikki frá sakligheit í eftirlønarspurninginum.

### Reingjan av úttalilsum.

Atli Hansen sigur, »Sámal Petur í Grund segði tað bart út, at um tað vóru 450,00kr ella 1000,00kr. meira um mánaðin til pensionistarnar, so valdi hann fullveldisætlanina framum meira pensión«.

Hesin mátin at endurgeva onnur uppá, hvar man snildisliga snarar úttalilsum hjá øðrum, er ikki ókendur, men sera ódámligur.

Úttalilsi sum her verður snarað, er úttalilsi mítt í løgtinginum um, at eg ikki vildi selja frælsi hjá føroysku tjóðini fyri eina upphædd, óansæð um hon var 450,00kr ella um hon var 1000,00kr.

Tað er sambandsflokkurin, og ikki undirritaði, sum við uppskoti sínum, setur hægri eftirløn uppímóti fullveldisætlan landsstýrisins.

Undirritaði arbeiðir tvørturímóti framímóti eini eftirlønarskipan sum bæði skal tryggja eldru borgarum okkara eina munandi hægri eftirløn, og skal gera føroyska samfelagi betri ført fyri at avgreiða síni viðurskifti á einum frælsum grundarlagi.

### Uppskot Sambandsflokksins.

Nú skal uppskot sambandsfloksins nokk síggjast meiri sum úttrykk fyri vilja floksins tá hann er í andstøðu, enn sum politikkur floksins annars. Vit hava jú ikki sæð nakað líknandi frá flokkinum tá hann hevur verið í samgongu, og høvdu vit tað, so hevði kanska verið komið longri við eftirlønarviðurskiftunum.

Hetta er eisini fyrstu ferð at sambandsflokkurin hevur bygt hugsjónir sínar á Samhaldsfasta Armeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

Harafturat skal inngjaldið síggjast sum eitt alternativ til minking í ríkisveitingini.

Sum tað framgongur av uppskoti sambandsfloksins, so gevur eitt inngjald í Samhaldsfasta eftirlønargrunnin uppá 800 milliónir eitt eftirlønarútgjald uppá uml.1000,00kr. um mánaðan.

Tað er ikki trupult at rokna út, at fyri at henda skipanin skal koma at virka sum ein skipan við einum útgjaldi sum tryggjar eftirlønarmóttakarum virðilig kor, so skulu fleiri ferðir 800 milliónir krónur gjaldast inn.

Hendan skipanin vil eisini viðføra at vit framhaldandi varðveita stóra stættarmunin sum longu ger seg galdandi á eftirlønarmóttakarum.

Eitt sindur undrunarsamt er tað, at partar av fakfeløgunum síggja hetta sum tað bestu loysnina á eftirlønarspurninginum.

### Eftirlønarviðurskiftini

Vit hava eitt samfelag sum á eftirlønarøkinum (fólkapensiónsøkinum) er afturúrsiglt.

Tá fólkapensiónin í síni tíð bleiv innførd, var hon nærum einasta skipan sum tey eldru kundu hella seg til.

Í dag mugu vit ásanna, at tey sum bert hava fólkapensiónina at dúva uppá gerast færri og færri. Hesi eru samstundis tey sum eru ringast stødd, við tað at aðrar eftirlønarskipanir, bæði føroyskar og útlendskar eru á einum heilt øðrum støði.

Tað at hesar skipanir eru so ymiskar, bæði viðvíkjandi inngjaldi og útgjaldi ger, at trupult er at gera eina skipan sum tekur hædd fyri sereyðkennum á øllum økjum.

Vit eiga at respektera frælsi borgaranna at avgera hvussu nógv av teirra inntjentu upphædd tey ynskja at seta í forbrúk og hvussu nógv borgarin ynskir at spara upp til sín egna aldurdóm.

Samstundis eiga vit at tryggja at allir lønmóttakarar spara upp í ein mun sum gevur eina upphædd sum tryggjar virðilig kor á ellisárum.

Harafturat eiga vit at tryggja samhaldsfesti í ein sovornan mun, at teir borgarar sum ikki blíva umfataðir av eftirlønaruppsparing, eisini fáa eina virðiliga eftirløn, tá tey koma til eftirlønaraldur.

Her átti ikki at verið nakar mótpartur, men bert viðspælarar.